# PEDAGOKURIN, SJÓNLEIKARIN OG LEIKSTJÓRIN ÚR MIÐVÁGI

**HALLA Á NORÐI THOMASSEN** ARBEIÐIR SUM PEDAGOKUR Á EINUM BÚSTOVNI FYRI UNG SINNISVEIK Í VESTURJÚTSKA BÝNUM BRAMMING. **TÓNLEIKUR** OG **SJÓNLEIKUR** ERU SERA TÝÐANDI PARTAR AV TÍ PEDAGOKISKA ARBEIÐINUM, OG HER KEMUR HALLA TIL SÍN RÆTT. TÍ HON ER BÆÐI SJÓNLEIKARI, **LEIKSTJÓRI** OG SANGARI



**PORTRETT**

Árni Joensen
arni@sosialurin.fo

Á stovninum í Bramming hava tey ein sjónleikabólk og ein tónleikabólk. Í tónleikabólkinum er eitt orkestur, sum átta búfólk manna. Í sjónleikabólkinum eru eisini átta búfólk. Tey hava júst havt eina framsýning fyri 300 børnum, og í mai skulu tey aftur á pall við einari sýning. Evnið í leikinum er yvirhøvur við innihaldi í sálarviðgerðini, men evnið verður snarað soleiðis, at tað verður stuttligt heldur enn tragiskt. Nógv av búfólkunum hava havt eina dapra lagnu, men sjálvt tað kann vendast til tað positiva og stuttliga, greiðir Halla frá.

Hon dugir ikki at siga, hvussu vanligt tað er at brúka sjónleik innan fyri sálarviðgerð í Danmark, men ein annar bólkur er í hvussu er í Århus. Hinvegin er tað rættiliga vanligt at brúka tónleik innan fyri psykiatriina, og á hvørjum ári verður skipað fyri einum tónleikaferstivali. Á festivalinum í ár vóru umleið 600 búfólk, og 35 orkestur vístu síni evni.

Halla ivast ikki, at føroyingar kundu fingið nógv burturúr at lagt størri dent á sjónleikin sum amboð at viðgera sinnisveik við. Hon vísir á, at talan er um fólk, sum eru rættiliga veik sálarliga, og sum hava lítla sjálvsvirðing. Men tað at sleppa á ein pall og at síggja og hoyra áskoðararnar klappa er við til at lyfta



*– Hvussu eg fái tíð alt? Eg veit ikki, men eg haldi, at eg verði ikki so lætt strongd, og eg gangi ikki so høgt uppí, um vaskitoyið bíðar ein dag ella tveir.*

MYND: ÁRNI JOENSEN

sjálvsvirðingina. Fyri einum ári síðani gjørdu tey í Bramming eina kanning, har tey spurdu búfólkini, hvønn týdning sjónleikurin og tónleikurin høvdu fyri teirra gerandisdag. Nógv av búfólkunum vórðu happað í fólkaskúlanum, tí tey vóru ikki sum hini og eru vorðin taparar í samfelagnum. Men kanningin vísti týðiliga, at sjónleikurin og tónleikurin góvu teimum størri sjálvsvirðing og betri mót upp á lívið. Tað ger, at tey klára seg betur í lívinum og kunnu minnast, at tað hava í hvussu er verið nøkur góð ting í lívi teirra, sigur Halla.

### Til Moskva

Í januar fekk Halla ein heldur óvæntaðan fyrispurning, tá hon bleiv spurd, um hon kundi átaka sær at fara á ein altjóða sjónleikafestival Moskva við átta donskum børnum í aldrinum 12 til 14 ár. Her var ikki talan um børn við sálarligum trupulleikum, men vanlig børn, sum høvdu tað frávik frá teimum flestu, at tey hava víst sera góð evni innan amatørsjónleik, og sum vórðu vald út til festivalin í Moskva.

Halla veit ikki rættiliga, hví júst hon bleiv vald til ferðina. Men nakað frammanundan hevði hon verið á einum skeiði í Århus, og hon heldur, at samskiparin hevði fingið eyga á seg tá.

Siðurin við sjónleikafestivalum sum tí í Moskva byrjaði fyri átjan árum síðani, og hesi árini hevur festivalurin ferðast ímillum ymisk lond. Í ár vóru 14 lond umboðað á festivalinum, og